# Gunnar bíðar eftir ráðum úr ráðnum

**Formaðurin í stýrinum fyri Listasavn Føroya sigur avgjørdur, at eingin leiðari er settur fyri Listasavnið enn, hóast stýrið hevur havt fund um starvssetanina, og tíðindi gingu um, at ein av umsøkjarunum var settur í starvið**

LISTASAVNIÐ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í farnu viku hevði stýrið fyri Listasavn Føroya fund, har nýggjur leiðari skuldi setast fyri savnið. Men ósemjan um nýggja leiðaran var so stór, at tað komu ymisk boð frá stýrinum eftir fundin.

Tríggir av teimum fýra stýrislimunum vóru fyri at seta ein av umsøkjarunum í starvið, og fjølmiðlarnir kláraðu eisini at bera tíðindini um, at Helgi Fossadal var settur í starvið, áðrenn formaðurin fyri stýrið vísti hesum aftur.

Gunnar Hoydal sigur avgjørdur, at eingin leiðari er settur fyri Listasavn Føroya enn, hóast fundur hevur verið um hetta í stýrinum.

– Vit hava havt ein internan fund við tagnarskyldu, og tí vil eg ikki gera viðmerkingar til, hvat fór fram á fundinum. Men fundurin varð niðurlagdur, og eg havi vent mær til Mentamálaráðið, sum eg umboði í stýrinum, við eini frágreiðing um støðuna, sigur Gunnar Hoydal.

### Bíðar eftir ráðum frá ráðnum

Formaðurin í stýrinum fyri Listasavnið, sum ikki vildi seta tann innstillaða umsøkjaran í starvið, vil hava Mentamálaráðið at meta um, hvørt umsøkjararnir eru skikkaðir eftir treytunum í starvslýsingini. Sambært lýsingini skal eitt fólk við listarligari útbúgving setast í leiðarastarvið.

– Nú bíði eg eftir, hvat Mentamálaráðið hevur at siga, og fyrr enn eg fái boð frá teimum, havi eg ikki fleiri viðmerkingar, sigur Gunnar Hoydal.

Sambært viðtøkunum fyri Listasavnið er tað stýrið og ikki Mentamálaráðið, sum setir leiðaran fyri Listasavn Føroya. Hví skal Mentamálaráðið so upp í málið?

– Eg havi mett støðuna at vera so serliga, at eg havi givið teimum eina frágreiðing um støðuna, og nú bíði eftir svari frá teimum. Meira kann eg ikki siga.



*Gunnar Hoydal, formaðurin í stýrinum sigur avgjørdur, at eingin leiðari er settur á Listasavni Føroya. Hann hevur vent sær til Mentamálaráðið við eini frágreiðing um støðuna*

# Skúlabyggingin fer at taka nógva tíð og orku

**- Ætlanin er at útbyggja og umbyggja Tofta skúla fyri einar 45 miljónir krónur, sigur nýggi borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen**

KOMMUNUMÁL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Eg eri ógvuliga spentur uppá tær uppgávur, sum liggja fyri framman, sigur Símun Johannesen, sum er nýggjur borgarstjóri í Nes kommunu*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

Mánamorgunin um 9-tíðina handaði fráfarandi borgarstjórin í Nes kommunu, Marjun Gaardbo, nýggja borgarstjóranum, Símuni Johannesen, lyklarnar til kommunuskrivstovuna.

Símun Johannesen sigur, at skipað varð fyri einum lítlum morgunmatarborði fyri teimum í nývalda bygdaráðnum, sum høvdu høvi at vera við.

- Aftrat okkum nývaldu og afturvaldu, sum vóru til morgunmatarborðið, var eisini fráfarandi borgarstjórin, Marjun Gaardbo og tey, sum arbeiða á kommunuskrivstovuni.

Marjun Gaardbo læt seg ikki stilla uppaftur á valinum seinast.

### Skúlabygging

Nýggi borgarstjórin vísir á, at eitt mál, sum fer at taka nógva tíð og orku hjá nývalda bygdaráðnum, er ætlaða skúlabyggingin.

Hann sigur, at talan er um eina út-og umbygging, sum sambært metingunum fer at kosta einar 45 miljónir krónur.

- Ætlandi byrjar útbyggingin av skúlanum tíðliga í hesum árinum, men áðrenn arbeiðið endaliga verður sett í verk, fer nýggja bygdaráðið at gjøgnumganga projektið, sigur nýggi borgarstjórin.

### Spennandi tíð

Símun Johannesen, sum er útbúgvin skipsførari, fekk næst flestar atkvøður á seinasta kommunuvali í Nes kommunu.

- Jú, eg eri ógvuliga spentur uppá tær uppgávur, sum liggja fyri framman. Hetta verður avgjørt ein spennandi tíð, sigur Símun Johannesen, sum á øðrum sinni er valdur í bygdaráðið í Nes kommunu - og nú er vorðin borgarstjóri.

# Tigandi kringvarpsstjóri

**Stjórin á nýggja kringvarpsstovninum, tí samanlagda útvarps- og sjónvarpsstovninum, Jógvan Jespersen, er ógvuliga tigandi, tá spurt verður um framtíðina hjá stovninum**

KRINGVARP



*Jógvan Jespersen, kringvarpsstjóri, er ógvuliga fáorðaður, tá spurt verður um nýggja loftmiðlastovnin*

Hóast Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya á nýggjárinum vórðu løgd saman til ein stovn við sama stjóra, ber ikki til at fáa nakað at vita um framtíðina hjá nýggja stovninum. Stjórin er tættur sum fløskan, tá spurt verður um framtíðarætlaninar.

Tað einasta, Jógvan Jespersen, kringvarpsstjóri, vil siga, er at einaferð í seinnu helvt av januar fer hann at leggja fram eina ætlan, har fyrsta stigið í samanleggingartilgongdini verður kunngjørt.

Tað er alt, hann vil siga, tá spurt verður eftir nýggja stovninum, sum varð veruleiki á nýggjárinum sambært broytingum í Kringvarpslógini.

Heldur ikki um navnið á nýggja stovninum vil stjórin siga annað enn, at sjálvandi skal nýggi stovnurin eisini hava eitt navn. Formliga skal Løgtingið við lóg áseta navnið, vísir hann á.

**ej**